# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jólamenn málaðu

**Í sínum starvi sum málarar málaðu Poli Mohr Poulsen og Bárður Vestergaard seinasta fríggjadag húsini hjá borgarstjóranum í Havn íklæddir sum jólamenn**



*Poli Mohr Poulsen og Bárður Vestergaard málaðu í síðstu húsini hjá borgarstjóranum í Tórshavnar komunu, Heðini Mortensen, í Jónas Broncksgøtu, íklæddir sum jólamenn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

JÓLAMENN

Tá vit settu okkum í samband við teir til tess at finna útav, hvør orsøkin er til løgna málarabúnan, søgdu teir m.a. "Nú hevur tað verið tosað so nógv um, at veðurlagið broytist. Vit vilja við hesum vísa á, at veðurlagið er ikki tað sama, sum tað hevur verið. Boðskapurin hjá okkum er, at vit skulu øll virka fyri, at útlátið verður minkað, sigur Poli. Sum málarar merkja vit væl broytingarnar í veðurlagnum. Bara tað at vit kunnu byrja at mála hesa ársins tíð, sigur alt. Vit byrjaðu at mála longu í februar í ár, og tað er eisini óvanliga tíðliga" sigur Poli.

Eg plagi ikki at luttaka í almenna kjakinum, men eg vil fegin fáa ein boðskap fram í hesum førinum, sigur Poli, sum viðgongur, at fólk, sum hava koyrt framvið, hava hugt sera nógv eftir teimum.

Jólabúnin verður tó ikki fasti málarabúnin hjá teimum báðum.

# Bilar á Quiztinum



*Luttakararnir í spurnarkappingini f.v.: Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, Janus Haraldsen frá Dimmalætting, Magnus Gunnarsson frá Sosialinum, og Sofus Hansen, bilbyggjari. Sofus tók við musikalsku avbjóðingini og framførdi ein sera vakran sang*

Í spurnarkappingini hjá Gunnari Nolsøe "á Quiztinum" í útvarpinum leygarkvøldið 9. november, vóru fleiri av spurningunum í samband við bilar og ferðslu.

Luttakarar vóru eisini fólk sum hava við bilar og ferðslu at gera. Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, og Sofus Hansen, bilbyggjari, kappaðust móti Janusi Haraldsen, blaðmanni á Dimmalætting, og Magnusi Gunnarsson, blaðmanni á Sosialinum, sum báðir skriva um bilar.

Úrslitið varð 16-18. Blaðmenninir á Dimmu og Sosialinum vunnu við tveimum stigum.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Bjarni í Sjúrðagarði, Kaldbak**, andaðist 10. desember á Landssjúkrshúsinum, 41 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Anni Højgaard**, døttir Hjørdis og Arna Højgaard, **Toftir**, andaðist leygarkvøldið á Glostrup Sjúkrahúsi, 50 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt og vinum, at min kære

**Anni**

og okkara elskaða dóttir og systir

andaðist á Glostrup Sjúkrahúsi leygarkvøldið
50 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni í Útvarpinum.

**Keith, Hjørdis, Arni, Jógvan**
**og Sigvør við familju**

Tey, ið vilja minnast Anni Højgaard, kunnu lata eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri bróðir okkara

**Jóhannes Jacobsen**
Kollafirði

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur og kransar, og takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarandi*
**Bernhard, Anna og Kada**

**Dagurin í morgin**
**12. desember. Epimachus,** deyður umleið ár 250. Kristin maður í Aleksandriu, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.